# Takk fyri arvagullið

## Heiðursrøða hjá Jónleif Johannesen til Martin Tórgarð




*Hvør liður, hvørt eygnabrá, hvør tóni og hvørt orð hjá Martini Tórgarð er fylt av dansigleði. Hann dansar so lættan, kvøður so reinan og livir so inniliga, meðan hann skipar*

HEIÐURSGÁVA LANDSINS

*Fram gekk ein av dvørgunum,*
*frá man frættast víða:*
*Ert tú komin at leika her,*
*ella ert tú komin at stríða?"*

Martin Tórgarð og hansara ættarlið, ið nú reikar um kempualdur, hava vunnið eitt megnarstríð, og tað eiga vit Føroyingar at vera takksamir fyri. Hesir menn og hesar kvinnur megnaðu at stríðast fyri, at dansinum var lív lagað.

Fyrst royndu teir við telgimuddi at kryvja harmonikubjólgarnar. Tað vísti seg ikki at vera mátin. Síðani tóku teir seg saman í Dansifeløg. Nú gekst betur. Besta vápnið í hesum stríði var dansigleði.

Tað var á hesum fronti, at Martin Tórgarð vísti seg at vera kempa mikil. Hvør liður, hvørt eygnabrá, hvør tóni og hvørt orð hjá Martini er fylt av dansigleði. Hann dansar so lættan, kvøður so reinan og livir so inniliga, meðan hann skipar.

Tað er ein søga um Martin og abba mín Jens Ludvík. Martin skipaði Runsival-stríðið. Dansurin gekk væl, og frásøgnin var livandi. Tá ið endurtøkurnar komu fyri, gekk dansurin javnt, tá Langalív fall og Dosmar Spaki fór foldum frá, var dansurin treystur, mælskur og rungandi, tá ið Tolvjavningarnir fullu, syrgjandi. Og væl livdu teir við.

Tá ið ørindið, har Karlamagnus sær Rólant sita deyðan, kemur fyri, møtast Martin og Jens Ludvík í ringinum:

*»Harra Guð Faðir av Himmiríki*
*meti keisarans neyð,*
*Hann sær hvar ið Rólant situr*
*undir steini deyður«*

Martin skal byrja, men einki orð kemur fram. Teir hyggja inn í eyguni hvør á øðrum, men einki ljóð hoyrist. Hóast tøgn, merkja øll í ringinum, at her er ein syrgilig, rørandi løta. Dansilagið, rørslunar, andlitsbráðini vístu tað. Her var einki at ivast í: Keisarin kendi mikla neyð.

Martin tók síðani í aftur niðurlagið og kvað víðari. Tað var ikki tikið aftur í aftur ørindið. Ørindið var kvøðið uttan orð.

Umframt ein livandi dans áttu Martin og hansara ættarlið eina rúgvu av kvæðum. Kvæðini eru í dag komin á skrift, og tónarnir festir á bløð og fløgur.

Martin Tórgarð eigur sín stóra lut í hesum arbeiði. Við eini rødd, einum minni, einum nótafesti, sum fáum er beskorið, hevur Martin Tórgarð kvøðið og sungið fleiri 1000 ørindi inn á band.

Í øðrum londum er tað óhugsandi at duga slíka ørindamongd. Men her heima hjá okkum eru enn fólk, sum duga kynstrið. Enn finnast kvæðakempur í Føroyum, sum lyfta arvin, ið Martin Tórgarð og onnur góvu føroyingum í varðveitslu.

Takk fyri arvagullið. Spurningurin er, um vit megna at varða tað?

Flestu okkara, sum luttaka í føroyskum dansi, síggja, at dansifeløgini vikna. Dansifeløgini orka ikki einsamøll at varða dansin sum fólksins ogn. Her má meiri til. Eg havi ein dreym um, at dansurin og kvæðamentan okkara kemur at hvíla á fýra sterkum beinum.

Bein eitt eru dansifeløgini.

Dansifeløgini, sum áhaldandi mugu vera hjartaslátturin í tí livandi dansinum.

Bein tvey er Mentamálaráðið.

Mentamálaráðið, sum metir kvæðakempu, sum ein kempu í føroyskum mentanarlívi. Mugu teir liva upp til sína metan.

Bein trý er Kringvarpið.

Kringvarpið, sum má liva upp til sína skyldu, sum varðveitari og ikki minst mennari í hesum høpi.

Tað fjórða beinið er fólkaskúlin.

Fólkaskúlin, sum eigur at geva næmingum okkara ein stoltleika og lærdóm í barmin, kvæðunum og dansinum viðvíkjandi.

Framyvir mugu øll hesi bein halda. Svíkur eitt, kemur dansurin at ridla; svíkja tvey, fellur hann. Dansurin hvílir á okkum øllum. Og hvat annað skal fólksins ogn gera? Sjálvsagt hvílir hon á fólksins herðum.

Undanfarin ættarlið hava varðveitt ein fjølbroyttan dans.

Frábrigdir bæði í dansi og uppskriftum liva enn í dag, tó væl minni enn fyrr.

Tað er tódnað í fjølbroytta dansinum og í rúgvismikla ørindavalinum, sum borið verður fram á gólvi. Hinvegin kann sigast, at fjølbroytni er størri enn nakrantíð. Kór, sjónleikir, rockbólkar, songfuglar, spælimenn, ung sum gomul bera kvæðini fram á ymsan hátt.

Er hetta skapandi, ella er hetta oyðandi?

Lat okkum ímynda okkum dansin sum eitt træ.

Tann vakri aldargamli bulurin er tann góði gamli føroyski dansurin við øldum á baki. Hann er vakur, hugvekjandi nærmast gandakendur. Av og á festir hann bløð. Tá er vakurleikin rámandi, ja, ævintýrkendur.

Bløðini eru tey, ið náa dagsins menn-iskjum. Bløðini eru tey, sum skulu vekja ta kenslu í føroyinginum, at hetta er okkara felags ogn. Eitt ár sæst kórsangur á krúnuni, okkurt árið Eivør, okkurt árið Týr.

Dansurin og kvæðamenntanin, bulurin á trænum má megna at bera krúnuna. Verður krúnan ov stór, so fellur træið. Fellur træið, er dansurin farin.

Líta vit aftur um bak og ímynda okkum, at dansurin ikki var livandi, kunnu vit hóma skaðan. Harkaliðið tók útgangsstøði í kvæðunum, Enek í Harkaliðnum, Eivør í Enek, Týr í Eivør, Valravn í Týr, og áðrenn vit vistu av, var arvurin farin av sporinum. Tíbetur hendi hetta ikki. Tíbetur hava øll, sum spæla sær við kvæðini, tikið útgangsstøði í dansinum. Hetta má áhaldandi verða so. Vit mugu leggja okkum í geyma, at størri krúnan er, sterkari má bulurin verða. Meiri vit tora at brúka dansin og kvæðini, betur mugu vit fjálga um tann siðbundna dansin og gomlu kvæðamentanina.

Megna vit hetta, verður dansurin sterkari enn nakrantíð.

At enda vil eg takka fyri tað álit, mær var sýnt her í dag, og vil eg ynskja Martini Tórgarð hjartaliga tillukku við heiðrinum.